Kunngerðablaðið A
2013
Givið út 7. juni 2013

Nr. 73 31. mai 2013

**Kunngerð**
**um**
**próvtalsstiga og døming**

Við heimild í § 3, stk. 4 í løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012, § 6, stk. 1 í løgtingslóg nr. 55 frá 24. apríl 2001 um útbúgving av manning á skipum o. ø., § 17, stk. 2 í løgtingslóg nr. 94 frá 29. desember 1998 um yrkisútbúgvingar, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 26. mars 2002 og løgtingslóg nr. 52 frá 17. mai 2011, § 6, stk. 2 í løgtingslóg nr. 49 frá 9. mai 2005 um stuttar framhaldsútbúgvingar á yrkisskúlum og § 9, stk. 1 í løgtingslóg nr. 57 frá 26. mai 2010 um heilsu-útbúgvingar verður ásett:

*Próvtalsstigin*

**§ 1.** Næmingur, sum til próvtøkur og ymsar inn-anhýsis eftirmetingar, skal prógva eitt kunnleika- og førleikastig, verður mettur sambært próvtals-stiganum niðanfyri:
1) 12: fyri framúr gott avrik.
2) 10: fyri sera gott avrik.
3) 7: fyri gott avrik.
4) 4: fyri hampiligt avrik.
5) 02: fyri nøktandi avrik.
6) 00: fyri ikki nøktandi avrik.
7) -3: fyri heilt vánaligt avrik.

**§ 2.** 12 verður givið fyri avrik, sum lýtaleyst ella mest sum lýtaleyst lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

*Stk. 2.* 10 verður givið fyri sera gott avrik, ið við onkrum smávegis lýtum lýkur flestu málini í námsætlanini í lærugreinini.

*Stk. 3.* 7 verður givið fyri gott avrik, ið við nøkrum lýtum, væl lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

*Stk. 4.* 4 verður givið fyri hampiligt avrik, ið hevur fleiri grov lýti og ikki lýkur málini væl í námsætlanini í lærugreinini.

*Stk. 5.* 02 verður givið fyri toluligt avrik, ið akkurát stendur mát, og í minsta mun lýkur málini í námsætlanini í lærugreinini.

*Stk. 6.* 00 verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur málini í náms-ætlanini í lærugreinini.

*Stk. 7.* -3 verður givið fyri heilt vánaligt avrik, sum als ikki kann verða góðtikið.

*Próvtalsgeving*

**§ 3.** Próvtal verður givið út frá eini heildarmeting av, í hvønn mun avrikið lýkur tey fakligu málini, ið eru sett í námsætlanunum fyri lærugreinarnar.

**§ 4.** Tann sum settur er at meta um avrikið, ásetir próvtalið.

*Prógv og skjalaváttanir*

**§ 5.** Á prógvum og skjalaváttanum skulu øll próvtøl sambært próvtalsstiganum verða lýst við samsvarandi bókstavi frá ECTS-stiganum sbrt. fylgiskjali 1.

*Gildiskoma og skiftisreglur*

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri næmingar, sum byrja útbúgving í august 2013 ella seinni.

*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 59 frá 13. mai 1997 um próvtalsstiga og aðra døming (próvtalskunngerðin).

*Stk. 3.* Kunngerð nr. 59 frá 13. mai 1997 um próvtalsstiga og aðra døming (próvtalskunngerðin), er tó framhaldandi galdandi fyri lesandi, sum eru byrjað útbúgving áðrenn august 2013.

*Stk. 4.* Hevur næmingur tikið ein part av út-búgvingini eftir gamla próvtalsstiganum, og verið burtur frá útbúgvingini longur enn eina lestrar-hálvu, tekur útbúgvingarstovnurin støðu til, hvør próvtalsstigi skal vera galdandi fyri restina av útbúgvingini. Í hesum sambandi kunnu próvtøl, givin eftir gamla próvtalsstiganum, verða um-roknað til nýggja próvtalsstigan. Soleiðis kann eisini verða farið framm, um næmingur av øðrum áðum hevur tikið ein part av útbúgvingini ella stak-greinir eftir gamla próvtalsstiganum.

*Stk. 5.* Útbúgvingarstovnurin kann, í samráð við Mentamálaráðið, gera av, at nýggi próvtalsstigin skal vera galdandi fyri næmingar, ið eru byrjaðir fyri 1. august 2013.

Mentamálaráðið, 31. mai 2013

**Bjørn Kalsø (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

**Fylgiskjal 1**

**Samband millum gamla og nýggja próvtalsstigan**
13 á gamla próvtalsstiganum svarar til 12 á nýggja próvtalsstiganum.
11 á gamla próvtalsstiganum svarar til 12 á nýggja próvtalsstiganum.
10 á gamla próvtalsstiganum svarar til 10 á nýggja próvtalsstiganum.
9 á gamla próvtalsstiganum svarar til 7 á nýggja próvtalsstiganum.
8 á gamla próvtalsstiganum svarar til 7 á nýggja próvtalsstiganum.
7 á gamla próvtalsstiganum svarar til 4 á nýggja próvtalsstiganum.
6 á gamla próvtalsstiganum svarar til 02 á nýggja próvtalsstiganum.
5 á gamla próvtalsstiganum svarar til 00 á nýggja próvtalsstiganum.
03 á gamla próvtalsstiganum svarar til 00 á nýggja próvtalsstiganum.
0 á gamla próvtalsstiganum svarar til -3 á nýggja próvtalsstiganum.

**Próvtalsstigin týddur til enskt**
12: For an excellent performance displaying a high level of command of all aspects of the relevant material, with no or only a few minor weaknesses.
10: For a very good performance displaying a high level of command of most aspects of the relevant material, with only minor weaknesses.
7: For a good performance displaying good command of the relevant material but also some weaknesses.
4: For a fair performance displaying some command of the relevant material but also some major weaknesses.
02: For a performance meeting only the minimum requirements for acceptance.
00: For a performance which does not meet the minimum requirements for acceptance.
-3: For a performance which is unacceptable in all respects.

**Samband millum próvtalsstigan og ECTS-stigan**
Próvtalið 12 í próvtalsstiganum svarar til A á ECTS-stiganum.
Próvtalið 10 í próvtalsstiganum svarar til B á ECTS-stiganum.
Próvtalið 7 í próvtalsstiganum svarar til C á ECTS-stiganum.
Próvtalið 4 í próvtalsstiganum svarar til D á ECTS-stiganum.
Próvtalið 02 í próvtalsstiganum svarar til E á ECTS-stiganum.
Próvtalið 00 í próvtalsstiganum svarar til Fx á ECTS-stiganum.
Próvtalið -3 í próvtalsstiganum svarar til F á ECTS-stiganum.

**Umseting til enskt frá próvtalsstiganum til ECTS-stigan**
The mark 12 on the scale is equivalent to A on the ECTS scale.
The mark 10 on the scale is equivalent to B on the ECTS scale.
The mark 7 on the scale is equivalent to C on the ECTS scale.
The mark 4 on the scale is equivalent to D on the ECTS scale.
The mark 2 on the scale is equivalent to E on the ECTS scale.
The mark 00 on the scale is equivalent to Fx on the ECTS scale.
The mark -3 on the scale is equivalent to F on the ECTS scale.